## Sofus í smiðjuni

Sofus Poulsen hevur í løtuni eina røð av framsýningum kring landið. Talan er um nýggjar oljumálningar, og sunnudagin letur framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík í Havn. Framsýningin letur upp klokkan 15, og mána- til mikudagin er opið millum klokkan 14 og 17.30.



## Kaupthing hækkar rentu

Kaupthing Bank byrjaði í vár kappingina um innlánskundar í Føroyum. Eitt av vápnunum her var at hækka innlánsrentuna á innlánum við tríggja mánaða uppsøgn í 4,5%, og nú boðar bankin frá, at rentan verður hækkað enn einaferð. Hesa ferð upp í 5%.

# Tað er ikki nóg gott

**Men vit skulu kortini minnast til, at tey tiltøk, sum vit nýliga hava sett í verk, eru ikki farin at virka áðrenn hendan kanningin varð gjørd, sigur Jógvan á Lakjuni**

PISAKANNING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var talan um hóvligan fagna, tá PISA-kanningin varð almannakunngjørd í Mentamálaráðnum í gjár. Fólk flest vistu, hvat var í væntu, og tí kom heldur vánaliga úrslitið ikki beinleiðis óvart á. Heldur ikki á Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra.

- Vit skulu minnast til, at tað er eitt hálvt ár gingið síðani undankanningina, so vit vóru eitt sindur stúrin fyri, at úrslitið fór ikki at verða so nógv øðrvísi enn undankanningin vísti, hóast at onkur bati var. Eitt nú hava vit fingið 450 stig í støddfrøði, sum er tað mesta vit hava fingið, segði Jógvan á Lakjuni við Rás2.



*Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, sá eitt sindur »millumfornøjaður« út, tá úrslitið av PISA-kanningini varð almannakunngjørt*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mentamálaráðharrin dylir ikki fyri, at úrslitið langt frá er nøktandi.

- Vit mugu viðganga, at okkara skúli liggur ov lágt. Men vit mugu hinvegin eisini minnast til, at tey tiltøk, sum vit hava sett í verk, eru gjørd eftir kanningina, og hava tí onga ávirkan á úrslitið, sigur Jógvan á Lakjuni.

Tiltøkini, sum hann sipar til, eru fleiri tímar, bæði í verandi skúlaári og eisini í komandi ári, umframt fleiri royndir inn í skúlarnar.

- Vit eiga at halda fast við tað, sum vit hava sett í verk. Men vit vita samstundis væl, at vit hava tørv á lærarum innan náttúruvísindagreinarnar, og har er tað, at Læraraskúlin kemur inn í myndina. Tað verður neyðugt at gera nakað har, sjálvt um eg ikki upp á standandi fót kann siga nágreiniliga, hvussu vit loysa tað málið, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Lesingin lykilin

Men samstundis, sum Jógvan á Lakjuni slær fast, at tað er alneyðugt at fáa fólk at útbúgva seg á náttúruvísindaliga økinum, so eru onnur viðurskifti, sum hava líka stóran týdning. Eitt av hesum er eftirútbúgving av lærarum.

Og júst hetta økið hevur verið gjølla viðgjørt í Sosialinum herfyri, har víst var á, bæði hvussu illa stóð til á økinum, men eisini hvussu tvørligt tað var hjá lærarum, skuldu teir verða so hepnir at sleppa til eitt eftirútbúgvingarskeið. Ikki minst tað, at teir máttu sjálvir hava matpakka við, skuldu teir ikki doyggja í hungri til hesi skeiðini.

Landsstýrismaðurin kundi tó upplýsa, at hesin trupulleikin var loystur, men at tað framvegis eru ábøtir neyðugar á økinum.

- Tað er eingin ivi um, at vit mugu skipa fyri nógv meiri miðvísari eftirútbúgving av lærarum, og eisini har mugu vit fáa Læraraskúlan við á banan, nakað, sum vit eisini fyri so vítt hava fingið. Tá tað kemur til lesing, hava vit sett gransking á stovn á økinum, sigur Jógvan á Lakjuni.

Og júst hetta við lesing metir mentamálaráðharrin er av alstórum týdingi.

- Lesingin er lykilin til alt annað hjá næmingunum, sigur hann.

Jógvan á Lakjuni heldur annars, at frágreiðingin er sera áhugaverd, og nemur eisini við broytingina frá fiskivinnusamfelagi til vitunarsamfelag. Men fremst av øllum heldur mentamálaráðharrin, at vit eiga at nýta kanningina konstruktivt.

Vit mugu sláa kalt vatn í blóðið og arbeiða saman í hesum málinum, segði Jógvan á Lakjuni við Rás2.

# SMS-stjóri á veg upp í politikk

**Býlingsstjórin í SMS, sum kemur av eini kendari, politiskari familju í Miðvági, umhugsar at stilla upp a Sambandslistanum. Kitty May Ellefsen hevur fingið nógvar áheitanir, og í kvøld fellur avgerðin, tá Føroya Væl í Havn hevur triðja og seinasta uppstillingarfund**

POLITIKKUR

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Ellefsen er ein kend politikarafamilja í Miðvági, so bara eftirnavnið kann ivaleyst sparka hurðar inn í einum politiskum flokki. Um tað er hetta Kitty May Ellefsen, býlingsstjóri í SMS, ætlar sær at gera, vil hon ikki siga beint nú, men váttar, at hon hevur fingið nógvar áheitanir um at stilla upp á Sambandslistanum.

Kitty May Ellefsen er dóttir Jens Eli Ellefsen úr Miðvági, og pápabeiggjarnir, Pauli Ellefsen og Svend Åge Ellefsen, hava verið nógv ár í politikki. Fyrrnevndi sum formaður í Sambandsflokkinum og løgmaður, og síðstnevndi sum løgtings- og landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin.

Kitty May Ellefsen, ið hevur arbeitt sum fulltrúi í Vinnumálaráðnum, áðrenn hon fór í starvið sum býlingsstjóri í SMS, hevur sagt núverandi starvið frá sær, og tí verður gitt dúgliga, at hon er á veg upp í politikk.

Hesar gitingar eru ikki heilt viðsíðuna av, tí sjálv sigur hon seg vera freistað av teimum áheitanum, ið eru komnar.

- Eg eri rættiliga impulsiv, og tí passar tað mær væl at skifta hest nú, sigur 39 ára gamla Kitty May Ellefsen.

Fyri Sambandsflokkin er hetta helst góð tíðindi, tí torført hevur verið hjá flokkinum at fingið yvirtala kvinnur at koma á listan. Flokkurin hevur gjørt av at stilla 32 til 34 valevni upp fyri alt landið, og higartil eru bert fýra kvinnur at finna millum evnini til at gerast valevni. Tær eru Ingvør Nolsøe, Majbritt Jacobsen, Sæðunn Ólavsdóttir og Rósa Samuelsen. Tann fimta verður altso eftir øllum at døma Kitty May Ellefsen, um hon verður góðkend á uppstillingarfundinum hjá Føroya Væl, ið er valfelagið hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi, sum heldur triðja og seinasta uppstillingarfund í kvøld. Her skal leggjast dentur á, at uppstillingin runt um í landinum langt frá er liðug, og tí er framvegis møguleiki fyri, at fleiri kvinnur koma á listan.



*Kitty May Ellefsen hevur fingið politikkin inn við móðurmjólkini, og sum fyrrverandi fulltrúi í Vinnumálaráðnum hevur hon royndir sum embætisfólk hjá einum landsstýrismanni*

*Savnsmynd*